lívdin
- í lívd hins hægsta

Mai 2007



**Sámal Clementsen:**

# Leggið allan brævbjálvan í kassan



Á kunningarborðinum í Lívdini stendur ein kassi við áskriftini „Brúkt frímerki og telekort".

Sum tey flestu vita, er tað Sámal Clementsen, ið stendur fyri hesi innsavning av frímerkjum og telekortum, sum hann ger klár og síðan sendir til Kristnastovu í Keypmannahavn. Hetta fyri at stuðla arbeiðinum har.

Sámal er gamal postmaður, so hann kennir alt til frímerki og brævbjálvar. Hann sigur, at tað í sambandi við frímerkini verður rátt til, at allur brævbjálvin verður lagdur í kassan. Tí tað kemur ofta fyri, at klipt verður ov nær frímerkinum. Hetta er sera óheppið, tí tá hava frímerkini einki virði. Klippið ikki nærri frímerkinum enn umleið ein cm.

Talan er ikki bert um føroysk frímerki. Øll frímerki hava virði, eisini t.d. íslendsk og donsk.

Sámal nýtir nógva tíð til arbeiðið við frímerkjunum. Hann klippir frímerkini út og leggur tey í smáar posar (250 gr.), so teir eru lættir at handfara og fylla lítið hjá teimum, ið hava frímerkini við í viðførinum til Danmarkar.

Frímerkini verða seld til frímerkjaseljarar – bæði í Danmark og í øðrum londum.

Peningurin, ið kemur inn fyri frímerkini, verður síðani brúktur til dagligar útreiðslur í Kristnastovu.

Sámal heitir á fólk, sum fara av landinum, um at siga sær frá, so tey kunnu hava frímerki við sær í viðførinum. Sámal hevur telefon 312566 / 512566.

**Minnist til at siga okkum frá!**

Vit heita á øll í samkomuni at siga okkum frá, um okkurt er, sum tit ynskja at fáa við í faldaran, eitt nú børn, ið verða fødd, brúdleyp, gullbrúdleyp og annað.

Í sambandi við rundar føðingardagar, skriva vit ein stubba um fólk í samkomuni, sum fylla 50, 60, 65, 70, 75, 80, 85, 90, 95 og 100 ár.

Teldupostadressan er: faldarin@livdin.fo



## Alt valdast hugburðin

Ein maður sá tveir múrarar standa og arbeiða. Hann vendi sær til annan teirra og spurdi, hvat hann gjørdi. „Eg laði múrsteinar“ svaraði múrarin. Maðurin vendi sær síðani til hin múraran og spurdi, hvat hann gjørdi. Stoltur svaraði hesin „Eg byggi eina dómkirkju“.

Soleiðis er eisini við arbeiði okkara í Lívdini. Vit seta ikki „bara“ stólar upp, baka køkur, klippa frímerki, ella passa teknikkin. Vit eru við í verki Harrans, við at byggja samkomu Guds.

*Absalon Áargarð*

# Vinir í Lívdini

### Hans Clementsen 50 ár



26. mars 2007 fylti Hans Clementsen í Hoyvík 50 ár. Eins og pápin, Sámal Clementsen, gjørdist Hans postmaður. Tey flestu hildu, at hann fór at ganga við posti, til hann varð pensioneraður, men so var ikki. Eftir næstan 25 ár sum postboð, legði hann á bláman og bleiv sjómaður, og siglir við „Ruth“ hjá Gullaki Madsen í Hirtshals.

Hans er ein arbeiðssamur og raskur maður, og honum dámar væl at rokast. Hann er giftur Lív, f. Joensen, sum er ættað úr Sandavági. Tey eiga børnini: Mourits, Guðrun og Bjørg. Eisini eiga tey ommu- og abbadóttrina Naomi.

### Tillukku við barninum



11. apríl fingu Hanna og Gunnar Nielsen á Argjum ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4.350 gr.

15. apríl fingu Anita og Karl Johannesen í Hoyvík eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3.700 gr.

2. mai fingu Jóna og Dánjal Jóhan Thomsen í Havn 10 mánaðar gamla sonin Dávid, sum er ættleiddur úr Korea.

---

## Tillukku við hjúnabandinum



### Annbritt og Alex

Leygardagin 30. desember 2006 giftust Annbritt Brynjolvsdóttir úr Hoyvík og Alex Jacobsen úr Klaksvík. Vígslan var í Klingruni hjá Føroya Tele í Hoyvík.

Annbritt og Alex búgva í Hoyvík. Annbritt eigur fýra ára gamla sonin Brynjar.

### Senøva og Dánjal

Leygardagin 26. august 2006 giftust Senøva Johansen úr Sandavági og Dánjal Petersen úr Havn. Vígslan var í Ebenezer. Senøva og Dánjal búgva í Sandavági.



## Á mannstevnu í Eysturríki





Í døgunum 6.-11. mars vóru 22 mans úr Føroyum á eini mansstevnu í Schloss Mittersill í Eysturríki, har havnarmaðurin Poul Guttesen, ið er gudfrøðingur, undirvísir.

Teir vóru: Oystein Petersen, Dánjal Pauli Poulsen, Ólavur Jøkladal, Heðin Poulsen, Svend Sivertsen, Jákup Pauli Johannesen, Árni Vitalis Hansen, Absalon í Gerðum, Magni Á Lakjuni, Bogi Andreasen, Jákup Oluf á Lakjuni, Rúni Højgaard, Jens Wang, Árni Jakobsen, Jóhan Syderbø, Páll Olsen, Árant Jacobsen, Johnny í Grótinum, Regin Hammer, Jákup Bech Jensen, Selmar Nielsen og Niels Stórá.

Heitið á stevnuni var „Við Gudi á yrkisleiðini", tað er um sambandi millum trúgv og dagliga arbeiði okkara.



*Poul Guttesen*

# Tiltøk

## TILTØK Á BREKKU 3

(bygningurin aftan fyri MBM)



**Undirvísing, bøn og bønarskúli** **týskvøld kl. 20.00**

| | |
|---|---|
| 1. mai. | Evni: „At finna tíð til bøn". Talari: Jógvan Zachariassen. |
| 8. mai. | Evni: „Týdningurin av at lurta". Talari: Jógvan Zachariassen |
| 15. mai. | Húsbólkar |
| 22. mai. | Evni: „Lovsongskvøld". Talari: Anna Háberg |
| 29. mai. | Evni: „At kenna leiðslu Guds". Talari: Jógvan Zachariassen |

**Bønarløta fyri ung** **mikukvøld kl. 18.00**
**Ungdómsmøti** **fríggjakvøld kl. 20.30**

## Gentubólkur fyri gentur í 1. og 2. flokki

Leygardagin 28. apríl kl. 11 byrjaði ein gentubólkur fyri gentur í 1. og 2. flokki í hølunum á Brekku.

Endamálið við bólkinum er, at genturnar skulu læra hvør aðra betur at kenna, og á tann hátt skapa betri trivnað teirra millum í Lívdini. Ætlanin er, at genturnar skulu koma saman triðja hvønn leygardag frá kl. 11 til 17 í hølunum á Brekku.

Frá kl. 11 – 12 er ein løta, har genturnar hoyra framhaldssøgu um ein trúboðara og skriva brøv o.a. til føroysk trúboðarabørn. Kl.12 eta genturnar eina lætta máltíð saman. Til kl. 17 er frítt hjá gentunum at spæla, ella gera tað, tær annars hava hug til. Onkuntíð verður skipað fyri túri til t.d. Bowlinghøllina, men hetta fáa foreldrini boð um frammanundan.

Genturnar verða vinarliga bidnar um at hava onkra leiku við – t.d. teirra yndisleiku.

Rachel Eysturtún, tlf. 771024, er stigtakari, og hon hevur ábyrgd av bólkinum.

## Massoud í Lívdini

Á møtinum í Lívdini leygarkvøldið 28. apríl og á familjumøtinum sunnudagin 29. apríl talaði Massoud Fouroozandeh, ið er ein fyrrverandi muslimur frá Iran, sum hevur givið sítt lív til Jesus Kristus.

Massoud býr nú í Danmark, har hann hevur sett á stovn fleiri samkomur. Sjálvur er hann leiðari í eini samkomu í Odense, har hann býr saman við konu og børnum.

Massoud Fouroozandeh hevur skrivað nógv umrøddu bókina „Den forbudte frelse“.

Bókin er at fáa hjá Logos Bókasøluni, J. Nolsøesgøta 17. Tórshavn, tel 312372: www.logos.fo




## Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla



### Sunnudagin 6. mai

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Sangmøti.*<br>*Talarar: Rúni Lómstein og onnur.* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Rómbrævið (8: 26-27).*<br>*Talari: Jógvan Zachariassen.* |

### Sunnudagin 13. mai

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Viðurkenning av tænastum.* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Rómbrævið (8:28).*<br>*Talari: Jógvan Zachariassen* |

### Sunnudagin 20. mai

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: Trúboðaraarbeiði í Teilandi.*<br>*Talari: Sørin Joensen.* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Ein ferð í lovsongi.*<br>*Fyriskipari: Anna Háberg.* |

### Sunnudagin 27. mai

| | |
|---|---|
| Familjumøti kl. 10.30: | *Evni: „Hvat heldur Gud um veðurlagsbroytingar?“*<br>*Talari: Jóhan Syderbø.* |
| Tilbiðjan og læra kl. 12.00: | *Evni: Rómbrævið (8:28-30).*<br>*Talari: Jógvan Zachariassen.* |

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni.*

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*